

# JUBILEUMS-SIG BYGDABALL Í H

**Í ár eru 10 ár liðin, síðani regattasiglingin varð hildin á fyrsta sinni, og tí verður meiri gjørt burturúr í Hósvík í ár. Yvir 1000 fólk verða væntandi savnað í Hósvík fríggjakvøldið til dans, stuttleika og hugna.**

Eydna Skaale

Regatta kann lýsast sum ein samanrenning ímillum eina bátastevnu og ein festival. Tað eru nógv bátafólk, men tað eru eisini nógv, sum koma við bili, tjaldi og kampingvogni.

- Tað eru nógv, sum hava bát, men sum ikki brúka hann nakað serligt. Her er so ein upplagdur møguleiki at loysa bátin frá bryggju og fara ein hugnaligan túr, heldur Rógvi Nybo, sum er kassameistari í Hósvíkar Róðrarfelag og ein av fyriskiparunum.

## Vaksandi áhugi

Tá regattasiglingin var fyri á fyrsta sinni fyri tíggju árum síðani, vóru einir 50-60 bátar við. Síðani tað er talið vaksið stútt, og í fjør vóru einir 100 bátar við.

- Stutt eftir, at vit byrjaðu við regattaini, sóu bátafestivalurin á Toftum og í Vestmanna eisini dagsins ljós. Her var veruliga ein tørvur, og tað sæst eisini aftur í áhuganum, vísir Rógvi á.

- Samanhaldið á regattaini er framúr gott, og tú kemur í samband við nógv fólk, sum tú annars ikki hevði møtt. Vit hava bæði gomul, tilkomin, ung, børn –ja, heilt niður í pinkubørn. Her er einki aldursmark, og tað er hugnaligt fyri øll at sigla ein túr saman. Men um náttina er tað frá 14 ára aldri og uppeftir. Tá hava vit vaksnamannadans og einki fyri børnini, ger Rógvi greitt.

## Alt á bryggjuni

Sum vant er strekkið, ið siglast skal, frá Eiði og til Hósvíkar. Á Eiði verður luttakaragjald á 150 kr rindað.

Ætlanin er, at bátarnir skulu fara av Eiði kl 19, fyri at raka á kyrrindini, tá farast skal um Streymin. Væntandi verða seinastu bátarnir í fylginum á Hósvík um 22.30 tíðina, og tá verður ein døgverðarættur at fáa. Á midnátt verður dansur við Jens Marna Hansen, og morgunin eftir verður borðreitt við morgunmati.

Undanfarin ár hevur bæði matur og dansur verið uppi í bygdarhúsinum, men í ár verður alt flutt oman á bryggjuna, so bátafólkið ikki skal ganga so langt niðan í bygdina.

- Vit hava leigað okkum eitt stórt dansitjald, sum vit seta upp á bryggjuni. Á tann hátt verður økið meiri savnað, og alt fer at ganga fyri seg, har bátarnir liggja, greiðir Rógvi frá.

Eisini kampingvognarnir fara í ár at standa tætt við bátarnar, so tey vera meiri við í veitsluni. Og hóast regattain í høvuðsheitum snýr seg um sigling, so økist talið av kampingvognum eisini ár um ár. Tí er kampingøkið munandi størri í ár, enn tað var í fjør.

## Tilmelding

Fyri at hósvíkingar skulu hava eina hóming av, hvussu nógv fólk kemur, og hvussu nógvur matur skal gerast, verða fólk í ár biðin um at melda til regattaina inni á heimasíðuni hjá Hósvík á www.hosvik.net.

- Hetta er ikki ein bindandi tilmelding, og fólk eru eisini vælkomin, hóast tey ikki melda til hjá okkum, men bara møta upp á Eiði. Men tað er ein fyrimunur fyri okkum og alla fyrireikingina, um vit vita umleið hvussu nógv fólk, vit kunnu vænta, sigur Rógvi.

Hann leggur afturat, at sum er, hava tey gjørt seg út til at taka ímóti 1000 fólkum.

- Tað er fyri tað mesta nevndin í Hósvíkar Róðrarfelag, sum hevur staðið fyri fyrireikingunum, men kommunan ger eisini ein stóran innsats, og nú tað líður so væl, er nærum alt bygdarfólkið eisini í sving, fyri at fáa tað seinasta upp á pláss. Tey flestu eru fegin um at hjálpa til, tí alt yvirskotið fer beint í róðrarfelagið, sum vit øll eru góð við, vísir Rógvi á.

Hann sigur, at undanfarnar regattair hava goldið fyri rógvimaskinur og ein nýggjan bát, sum tað annars vildi tikið ein so lítlum róðrarfelagið langa tíð at savnað saman til, um tey ikki høvdu regattaina.

## Geva nakað aftur

Men í ár er tað nakað serligt við regattaini.

- Vit hava havt hetta tiltakið í 10 ár. Undirtøkan er bara vaksin fyri hvørt ár, og hóast tað kanska serliga eru fólk úr Sundalagnum, so hava vit eisini afturvendandi gestir úr bæði Suðuroynni, Vágunum, Sandoynni og Norðoyggjum.

- Fólk hava tikið so ómetaliga væl ímóti regattaini, og í ár vilja vit veruliga royna at geva øllum hesum fólkunum okkurt aftur. Vit royna allatíðina at gera tiltakið betri, men í ár hava vit veruliga spílað okkum út, og tað vóni eg, at fólk fara at merkja, sigur Rógvi at enda.

*eydna@sosialurin.fo*



